Borgarstjórin í Aberdeen heimaftur eftir fyrstu vitjan í Føroyum:

# – Fantastiskt



*Jan Christiansen og Lord Provost úr Aberdeen í Norðurlandahúsinum*
*Mynd Jan Müller*

**-Tit eiga eitt so ótrúliga vakurt land, og eg fari at gera mítt til, at fleiri skotar velja Føroyar sum ferðamál í framtíðini sigur borgarstjórin í Aberdeen, sum júst hevur verið á vitjan fyri fyrstu ferð. Hann fer heimaftur við nógvum hugskotum og góðynskjum**

SAMSTARV
*Jan Müller*

- Eg hevði sæð fram til hesa løtuna í meira enn 10 ár. Hetta eru nakað so ótrúliga oyggjar. Vit hava vitjað nógva staðni og ikki minst var túrurin við Norðlýsinum inn undir Nólsoynna heilt fantastiskur – eitt ógloymandi minni fyri lívið sigur ein sera fegin og bjartgskygdur borgarstjóri í Aberdeen, Lord Provost, John Reynolds við blaðið, nú hann ger seg til at fara av aftur landinum eftir sína fyrstu ferð til Føroya nakrantíð.

- Tá tú hugsar um, at Skotland og Føroyar eru næstu grannar, so átti slíkar upplivingar, sum okkum hevur verið fyri, eisini at verið nakað, ið aðrir av mínum landsmonnum áttu at upplivað, og eg skal lova tykkum fyri, at eg fari at gera mítt ítarsta fyri at vekja áhugan fyri Føroyum sum ferðamannalandi fyri mínum landsmonnum sigur John Reynolds samtíðis sum hann fegnast um rutusambandið hjá Atlantsflogi millum bæði londini. Borgarstjórin sigur, at eitt tað fyrsta hann fer at gera afturkomin til Aberdeen, er at hyggja eftir, hvussu tey kunnu fáa vakt áhugan hjá vanliga skotanum at ferðast til Føroyar fyri at uppliva náttúruna og fólkið her. Í sama viðfangi vilja skotar eisini bjóða føroyingum at vitja teirra vakra og søguliga land. Lord Provost er eisini fegin um, at Atlantsflog flýgur uppá Aberdeen heldur enn til Glasgow, tí tað merkir, at íbúgvararnir í hesum partinum av Skotlandi kunnu fáa gagn av samskiftinum við Føroyar.

John Reynolds, sum var í Føroyum saman við 50 øðrum landsmonnum til skotsku vikuna, heldur møguleikarnar fyri víðkaðum samstarvi verða sera stórar. Og her hugsa hann ikki minst um fiskivinnusamstarv. – Vit hava nógv felags áhugamál, og fiskivinnan er eitt teirra. Eg ímyndi mær, at vit fara at hava nógv brúk fyri tykkara fiski, nú fiskiskapurin í Norðsjónum verður so nógv skerdur vegna ovfisking og fiskaloysi.

Borgarstjórin vísir á, at fólkið í t.d. Aberdeen etur serstakliga tosk og hýsu. Roynt hevur verið at fáa fólk at eta onnur fiskasløg eisini, men kortini eru toskurin og hýsan tey mest týðandi fiskasløgini. –Tá útlit eru fyri, at vit sjálvi fara at veiða minni av toski og hýsu, so er greitt, at vit verða uppaftur meira bundin av at fáa hesi fiskasløg úr eitt nú Føroyum í framtíðini.

John Reynolds sær eisini møguleika fyri, at føroyskir fiskimenn fara at fáa hægri prís fyri fiskin í framtíðini, nú eftirspurningurin helst fer at vaksa. –Tá vit ikki sleppa at veiða sjálvir, so vóni eg bert, at tykkara fiskimenn vilja geva okkum eina hjálpandi hond og entá bjarga okkum, og at teir so afturfyri fáa góðan vinning. Brúk er fyri samstarvi eisini á hesum øki, soleiðis at fiskimenn, framleiðandi ídnaðurin og brúkararnir kunnu verða nøgdir.

Lord Provost sigur, at hann hevur kent seg sera væl móttiknan í Føroyum líka frá at hann var sera væl móttikin á hotellinum til hann takkaði fyri seg í Norðurlandahúsinum. -Øll hava veriðso fryntlig og blíð, so eg havi kent meg sum heima her hjá tykkum.

Borgarstjórin sær fyri sær fleiri nýggjar samstarvsmøguleikar í framtíðini. Her hugsar hann ikki minst um oljuna. – Eg veit væl, at tit hava ikki funnið olju enn, men hetta tekur sína tið og krevur sítt tol. Tað kenna vit alt til í Skotlandi, og her hugsi eg um tey fyrstu árini. Vit hava gjørt okkara mistøk í hesi vinnu, og tað eru m.a. tey, sum vit ynskja, at tit skulu læra av, soleiðis at tit sleppa undan at gera somu mistøk sum vit.

Jan Christianssen, borgarstjóri er sera fegin um, at býráðið í Aberdeen, sum nú situr, er so áhugað í at økja um samvinnuna við Føroyar. - Har vit fyrr hava kent tað sum, at tað vóru vit sum í heilum bankaðu á teirra dyr, har eru tað nú teir, sum virkuliga meina nakað við samstarvinum og fegnir vilja taka ítøkilig stig fyri at menna tað. Skotska vikan var so ein byrjan og haraftrat kemur, at vit hava grunnin Tórshavn-Aberdeen, sum hevur til endamál at styrkja samvinnuna. Hesin grunnurin hevur stóran týdning í so máta.

Arbeitt verður at halda fram við slíkari viku og arbeitt verður við nógvum øðrum eisini. Eitt nú at fáa eitt samstarv á fótbóltsøkinum, at menna mentanarsamstarvið og ikki minst á útbúgvingarøkinum. Jan Christiansen sigur, at fleiri og fleiri ung velja at fara til Skotlands at lesa, og her serstakliga í Aberdeen. Í løtuni eru umleið 50 føroyskir næmingar knýttir at lærdu háskúlunum í Aberdeen, bæði beinleiðis á staðnum og sum fjarlesandi. Fyri bert fáum árum síðani var tað hendinga føroyingur, sum fór tann vegin at lesa.



*Umborð á Norðlýsinum. Birgir Enni, skipari saman við borgarstjórahjúnunum úr Aberdeen*



*Frá vinstru Dávur Magnusen, sum spældi trombon í hellinum í Nolsoy saman við Hávardi Enni, manning á Norðlýsinum og borgarstjóranum í Aberdeen*
*Mynd Birgir Enni*



Kári Jacobsen, kommunulækni í Havn:

# Vit boyggja okkum ikki

**Grundgevingin fyri, at Kaj Kallsberg valdi at siga seg úr starvinum sum kommunulækni í Havn, er afturvendandi trupulleikin við Tórshavnar Býráð um eina telduskipan. Kommunulækni, Kári Jacobsen, skilir væl avgerðina hjá Kaj Kallsberg, men hann heldur tað er ein vanlukka, at ongin loysn ikki er funnin á trupulleikanum enn**

NÝGGJ TELDUSKIPAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Tað er púra skilligt, at Kaj Kallsberg hevur valt at fara úr starvinum, men tað er katastrofalt, at maðurin má kenna seg noyddan at siga seg úr starvinum, tí hann kennir seg trýstan, sigur Kári Jacobsen*

Í gjár fréttist í útvarpinum, at tríggir kommunulæknar hava valt at siga seg úr starvinum frá 1. januar 2004. Talan er um Kaj Kallsberg og Petur Højgaard í Havn og Jaspur Petersen í Klaksvík. Útvarp Føroya visti ikki at siga, hvør orsøkin er til avgerðina hjá Petur Højgaard og Jaspur Petersen at fara úr starvinum, men ein umstrídd telduskipan er orsøkin til, at Kaj Kallsberg hevur valt at fara frá sum kommunulækni í høvuðsstaðnum.

Kjarnin í málinum er, at Tórshavnar Býráð ynskir, at kommunulæknarnir í Havn skulu nýta eina íslendska telduskipan, men flestu kommunulæknarnir sýta fyri at nýta skipanina. Teir vilja heldur hava ein danska skipan, sum svarar til líknandi skipan, ið starvsfelagirnir í Danmark nýta dagliga.

- Eingin hevur hægri útbúgving enn vit. Vit hava brúkt eitt ótal av árum at koma so langt. Fyrst tóku vit læknaútbúgvingina, síðan specialiseraðu vit okkum Eftir tað, arbeiddu vit á bygd og langt um leingi hava vit fingið starv sum kommunulæknar í Havn, sum vanliga varð mett at verða toppurin hjá einum kommunulækna í Føroyum. Vit sita so í dag, eftir góð 20 ár, uttan haldgóð tól, og tað er ein vanlukka, sigur Kári Jacobsen, kommunulækni í Havn.

## Stríð síðan 1995

Kári Jacobsen er sjálvur ein av sjey kommunulæknunum, ið ynskir donsku skipanina Med-Wind heldur enn íslendsku Saga telduskipanina. Hann greiðir frá, at stríðið millum Tórshavnar Býráð og kommunulæknarnar hevur staðið á, síðan 1995, og enn er eingin loysn funnin á málinum.

Kári leggur afturat, at á bygdunum í Føroyum hava kommunulæknarnir ongar trupulleikar at fáa donsku skipanina, men í Havn ber einki til, og tískil er høvuðsstaðurin eftirbátur á økinum.

Spurdur, um tíðin ikki fyri langari tíð síðan er búgvin til, at fáa trupulleikan við telduskipanini loystan, svarar Kári, at hann er ikki greiðir, hvat fer at henda í næstum. Hann sigur kortini við vissu, at kommunulæknarnir, Andor Ellefsen, Kristianna Nordendahl, Sølvi W. Olsen, Turid Petersen, Jenis av Rana og Sten Larsen úr Kollafirði ikki fara at boyggja seg fyri ynskinum hjá Tórshavnar býráð.

– Tað er heldur eingin sum helst grund at hava fleiri fundir um málið, tí býráðið veit fullvæl,hvar vit standa í málinum, so tað er eingin meining at fundast meir, sigur ein avgjørdur Kári Jacobsen.

Kári Jacobsen setir eisini stórt spurnartekin við, um allir býráðslimirnar eru greiðir yvir, hvat málið snýr seg um. Hann sigur, at eitt drúgt brævaskrifti hevur verið við sosialu nevnd, ið varðar av málinum, men nevndin vil bara trýsta íslendsku skipanina yvir høvdið á kommunulæknunum. *Vita kommunulæknarnir í Havn ikki betur hvørji tól, teir skulu nýta, enn fólk á sosialu nevnd á býráðnum?* Trupulleikin er, at fólk á trivnaðardeildina á býráðnum hava lurtað ov nógv eftir einum ávísum virki á Velbastaðvegnum, sum hevur gjørt lobbyarbeiðið fyri teirra teldurskipan. Kortini geva vit okkum ikki, tí vit vilja ikki síggja nakað til íslendsku skipanina, fortelur Kári Jacobsen.

## Skilir væl Kaj Kallsberg

Seinastu árin hevur javna verið hoyrt graml um, at stórt læknatrot er í Føroyum, og ikki minst í Havnini. Spurdur, um tað ikki er óheppið, at ein starvsfelagið velur at siga seg úr starvi, orsaka av eini ósemju um eina telduskipan, tá tørvurin á læknum er so stórur, svarar Kári, at hann skilir Kaj Kallsberg væl. – Teldan er í dag tað týdningarmesta arbeiðstóli hjá læknum, tí øll vitan verður goymd har. Tað er púra skilligt, at Kaj Kallsberg hevur valt at fara úr starvinum, men tað er katastrofalt, at maðurin má kenna seg noyddan at siga seg úr starvinum, tí hann kennir seg trýstan, sigur Kári Jacobsen.

Kommunulæknin sigur, at eingin veit við vissu, hvussu nógvar sjúklingar, hvør kommunlækni hevur, men hann rímuliga vissur í, at Kaj Kallsberg hevur millum teir flestu í Havn. – Stóri spurningurin er, hvør nú skal loysa uppgávuna hjá Kaj, tí tað er ein sannroynd, at tað er ómetaliga torført at fáa kommunulæknar at søkja starv í Havn, greiðir Kári Jacobsen frá.

Spurdur, um aðrir kommunulæknar í høvuðsstaðnum ætla at siga seg úr starvið, eins og Kaj Kallsberg hevur valt at gera, svarar Kári, at einstakir kommunulæknar hava tosað um tað sama, og hava gjørt vart við sína ónøgd, har víst hevur verið á, at tað er ov langt úti, at arbeiðstólini ikki eru nøktandi.

Seinni í dag (týsdagin), skuldi fundur aftur verða um telduskipanina millum kommunulæknarnar og Tórshavnar Býráð, og spurningurin er so um partarnar kunnu koma nærri hvørjum øðrum um eina loysn um teldutrupulleikan, sum eftir øllum at døma hevur havt við sær, at Kaj Kallsberg fríggjadagin boðaði Bill Justinussen, landsstýrismanni, frá, at hann 1. januar gevst sum kommunulækni í Havn.

TELEFONBÓKIN 2004

Seinasta freist at lata broytingar inn er fríggjadagin 7. november 2003

**Í mars 2004 verður telefonbókin fyri ár 2004 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

**Hvítu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2004 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 650 í telefonbókini 2003,ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undiruppttøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undiruppttøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Fríggjadagin 7. november 2003 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A)+(D) Standardlýsing .......... kr. 650,00
(B) Stórt navn .......... kr. 50,00
(C) Innramming .......... kr. 100,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) .. kr. 25,00
(sí dømi á s. 648 í Telefonbókini 2003)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 649 í telefonbókini 2003, ið skal sendast til:
Teleforlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*

**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**
**www.gulu.fo · info@gulu.fo**